# Sjóvar Kommuna skipað

KOMMUNUSKIPAN
*Jákup Mørk*

Kommunustýrið fyri Sjóvar kommunu næstu 4 árini er nú skipað.

Borgarstjóri verður Malena Thomsen og varaborgarstjóri Sonni Johansen

Í fíggjarnevndini sita Malena Thomsen, formaður, Sonni Johansen og Kaj Otto Frederiksberg. Eykalimir verða Pole Hansen og Hans Petur Jacobsen

Í trivnaðarnevndini eru Hans Petur Jacobsen, Meinhard Jacobsen og Pole Hansen. Eykalimir verða Tummas Eli Joensen og Kaj Otto Frederiksberg

Í vinnunevndini eru Kaj Otto Frederiksberg, Sonni Johansen og Tummas Eli Joensen. Eykalimir verða Meinhard Jacobsen og Pole Hansen

Í teknisku nevnd eru Tummas Eli Joensen, Pole Hansen og Hans Petur Jacobsen. Eykalimir verða Sonni Johansen og Kaj Otto Frederiksberg

Somuleiðis skal kommunan velja limir í kommunalar felagsskapir av ymsum slag. Í Kongshavnar havnarstýri eru valdir Kaj Otto Frederiksberg og Sonni Johansen, sum er tiltakslimir. Til IRF er Tummas Eli Joensen valdur. Har er Meinhard Jacobsen tiltakslimur. Til SEV eru Meinhard Jacobsen og Sonni Johansen valdir. Har eru eykalimiirnir Pole Hansen og Hans Petur Jacobsen. Í Føroya Kommunufelag er Hans Petur Jacobsen valdur. Pole Hansen er eykalimur. Til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim eru tað Meinhard Jacobsen og Tummas Eli Joensen. Til Skálafjarðar Sløkkilið Sonni Johansen og Meinhard Jacobsen. Til skúlastýrið eru Pole Hansen og Meinhard Jacobsen valdir, meðan Sonni Johansen og Kaj Otto Frederiksberg eru eykalimir. Og endaliga eru Malena Thomsen og Pole Hansen vald í Kommunalu Skattakærunevndina.

# Steinbjørn við endurminningum

**Steinbjørn B. Jacobsen hevur latið úr hondum Grund 1, sum eru endurminningar hjá kenda sandvíkinginum**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Í fyrstu bókini við endurminningum greiðir Steinbjørn ógvuliga livandi frá uppvøkstrinum í føroyskari bygd í 30, 40 og 50 árunum.

Í endurminningunum fer Steinbjørn víða, hann ferðast aftur og fram í lívi sínum. Mangt, sum er hent í vaksnamannlívi hansara, verður sett í samband við uppvøksturin, og tað, hann hevur fingið sum barlast í barnaárunum, er mangan nakað, hann sær aftur og skilir, tá ið hann gerst tilkomin.

Flestu kenna Steinbjørn sum rithøvund, men mong kenna hann eisini sum lærara, fyrst og fremst í Húsavíkar skúla, í Kommunuskúlanum og sum stjóra og lærara á Føroya Fólkaháskúla.

Sum rithøvundur gjørdist hann kendur í trýssunum. Hann var so at siga ein av teimum, sum birti í modernismuna í føroyskum skaldskapi, sum í fyrstu syftu ørkymlaði, tí hesar stuttu rímleysu yrkingarnar brutu so nógv frá tí vanliga og kenda.

Børnini kendu hann frá teimum inniligu søgunum um Hønuna og hanan, Mæið og Hin snjóhvíta kettlingin, sum Bárður Jákupsson so vakurt myndprýddi. Sum rithøvundur hevur hann lagt nógv eftir seg, sum hevur verið til gleði og gagn hjá yngra ættarliðinum, bæði barnabøkur og skúlabøkur til smá og stór børn.

Steinbjørn hevur sum rithøvundur lagt dent á gerandisdagin. Tað sást m.a. í sjónleikinum Skipið sum varð leiktur í Havn 1975, eisini sum sjónleikahøvundur breyt hann upp úr nýggjum. Vit vóru von við gamlar leikir, har fólk sótu framman fyri grúgvuna og bundu og karðaðu, men nú hendi ein broyting, og sigast má, at Steinbjørn var við til at seta hetta í verk við nýggjum sjónleikahandritum, sum bygdu á gerandisdagin hjá vanliga føroyinginum bæði á sjógvi og landi.

Í endurminningunum verður sagt, at barndómurin í áramáli ikki er langur, men minnini kunnu kortini gera nógv um seg, hvussu lítil og einkisigandi tey tykjast at vera.




*Grund 1 er heitið á nýggju útgávuni, sum er fyrsta bókin við endurminningum hjá Steinbjørn B. Jacobsen*

